# BØNARLØTAN

**Apríl** **2020** **35. árg.**

**Í veingjaskugga Tínum søki eg mær lívd,**
**inntil vannlukkan er av!** *Sálmur 57. 2*

***1. Mikudagur*** ***Fil. 1.1-30***

## GRØNLAND, Qaqortoq
## Marjun og Páll Poulsen

Vit eru innibyrgd í Qaqortoq av smittuvanda. Eingin sleppur til ella frá. Túrurin hjá okkum til Danmarkar 24. mars og síðan til Føroyar á páskum varð avlýstur. Um legurnar kunnu haldast, er serligur tørvur á forbøn fyri hjálparfólki, sum ikki fáa tikið endaliga avgerð, fyrr enn støðan er greiðari.

Paulus var til reiðar til tríggjar støður samstundis:

1. At Harrin kom aftur
2. At doyggja
3. At liva og virka undir teimum umstøðum, ið vóru, og at brúka vit og skil.




***Korona – hvussu hugsa vit og hvat gera vit fyri at verja okkum og onnur?***

## KRINGVARPIÐ

5. apríl útvarpsmøti, Betesda, Klaksvík

## R7 (meir á www.evr.fo)

Sunnukvøld . kl. 20 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## FØROYAR



### Birgit og Svenning av Lofti

Vit eru fegin at vera heimkomin, eftir at Birgit varð kannað og skurðviðgjørd á Ríkissjúkrahúsinum. Viðgerðin eydnaðist væl, og Birgit hevur fingið at vita, at hon er frísk. Tær seks vikurnar í Danmark góvu okkum fleiri møguleikar í tænastuni. Hjartaliga takk fyri forbøn og stuðul frá tykkum, sum hava staðið saman við okkum. Vit halda á í tænastuni, m.a. á nýggju Lívlinjuni hjá Ebenezer, tel. 511805.

**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**

## ATLANTIC MISSION

Túrurin í Føroyum við Juvel II er avlýstur. 3. - 13. aug. er framvegis ætlanin at vitja býin Virserum í Svøríki. Hjálparfólk kunnu tekna seg hjá Páll á Lakjuni, tel. 744404, podl@olivant.fo, ella Ruth Gaardlykke, tel. 519090, gaardlykke@kallnet.fo

## NEYÐHJÁLP TIL BAHAMAOYGGJAR

Av korona varð hjálpartúrurin útsettur. Stuðul til samkomurnar har yviri kann framvegis flytast á konto 6460-561.509.9 í BankNordik. Meir kunning hjá Ragnar Sundstein, tel. 758110.

## *2. Hósdagur* *Jer. 17.1-27*



**DANMARK, Kristnastova**
**Sólva og Jákup Hansen**
**Dora og Niels Pauli Nónstein**
**Sigrid 12, Andreas 10, Kristina 9**

Øll møti og tiltøk í Kristnastovu eru avlýst. Vit netvarpa tí møtini fríggjakvøld kl. 20 og sunnudag kl. 11 á facebook hjá Kristnastovu. Vit hava samband við bæði okkara ungu og eldru fyri at vita, hvussu tey hava tað. Okkum tørvar vísdóm at stimbra samkomuna andaliga og menniskjaliga, bæði nú og tá vandin er av.

**Susan og Øssur Berghamar**

Nú koronakrímið av álvara hevur gjørt vart við seg, kunnu vit ikki vitja á Ríkissjúkrahúsinum og Sjúklingahotellinum. Heldur eingin andakt verður hildin hesa tíðina. Biðið fyri sjúklingunum og teirra avvarðandi, at Harrin heldur teimum uppi og gevur teimum styrki, mót, náði og frið.

## *3. Fríggjadagur* *Jeremias 18.1-23*

**GRØNLAND, Nuuk**
**Hans Sivertsen**
**Ane og Filip Sivertsen, Cecilie 17, Kristian 15**
**Anne-Sophie og Óli Tindalíð, Liljan 13, Leanne 12, Luckas 0**

13. mars fekk Hans staðfest Covid 19 og varð frískur aftur 27. mars. Av korona er óvissa um legurnar og siglingina hjá Immanuel. Torført er nú hjá møguligum hjálparfólkum úr Føroyum at vita, um og nær tey skulu keypa ferðaseðlar. Avbjóðingin er so, um vit megna at halda legurnar eftir skránni, tí vit mangla enn heilt nógv hjálparfólk!

## *4. Leygardagur* *Fil. 2.1-30*



**FØROYAR**
**Khuldah og Sámal Mikkelen**
**Josva 10, Ester 9, Samuel 5**
Tænastan er nú broytt av smittuvanda. Vit ringja til fólk fyri at hjálpa og troysta. Vit leggja eisini andaktir, talur, sang o.a. á betesda.fo.




**OM, Suðurafrika**
**Mamelodi Aids Hope**
**Tanja Mortensen**
Dagliga neyðin er stór, nú smittuvandin hóttir, serliga í fátækraøkjum – nógv hava ikki fría atgongd til vatn og spritt, og sápa er luksus. Rúsevnismisnýtslan ger, at fleiri búgva á gøtuni. Vit royna serliga at hjálpa børnunum.

## *5. Pálmasunnudagur* *Jer. 19.1-15*



**USA, Alabama, NTM**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**
Øll ferðing uttanlands er útsett. Í apríl vitja vit NTM í Missouri og samkomuna, vit gingu í, tá vit arbeiddu á venjingarskúlanum. Vit vóna at fara til Asia síðst í juni á týðandi fundir í Jakarta og Manila, men tað veldst um koronasmittuna. Eg skal undirvísa í samkomuni her í Montgomery, meðan vit eru heima.

**USA, Nebraska, Ethnos 360 (fyrrv. NTM)**
**Rachel og Peter Hansen, Caleb 17**

## *6. Mánadagur* *Jer. 20.1-18*



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Øll eru bangin fyri ymisku fylgjunum av korona. Harrin biður okkum ikki óttast, tí „Gud er skjól og styrki okkara, hjálp í neyðini, til fulnar royndur. Tí óttast vit ikki, um so jørðin umskiftist...“ Sálmur 46, 2-4, 8a.

## *7. Týsdagur* *Fil. 3.1-21*



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Vit hava koronatilburðir her, og tí fari eg ikki til Onglands at undirvísa, men undirvísi á netinum. Biðið um gott netsamband. Í apríl verður umsetingarbeiðið eisini gjørt á netinum. Biðið fyri heilsu okkara.



**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 15, Victoria, 13,**
**Emma Grace 12, Jónatan 10,**
**Markus 8, Evita 5, Joy 3**

Takkið fyri tey átta, sum vórðu doypt fyri stuttum. Tað er eitt stórt stig at taka her, tí tey verða ofta atsókt av familju ella vinum aftaná. Biðið, at tey hvørki víkja til høgru ella vinstru í trúnni.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## *8. Mikudagur* *Jer. 21.1-14*



### FØROYAR
**Unn og Jógvan Zachariassen**

Møtirøðin hjá Franklin Graham UK 2020, sum Jógvan hevur ábyrgd av, er útsett til í heyst. Jógvan er tí komin heim.

### FØROYAR
**Shamila og Høgni Johannesen, Adonia 12**

Av korona vórðu túrarnir til Pakistan og Nepal útsettir. Joy er í USA við YWAM. Biðið fyri henni, nú sóttin herjar. Minnist eisini Adoniu hesar dagar.

**– Elin og Jógvan Jacobsen, Boas 12**

**– Lis Zachariassen**

**– Annika og Poul Færø**

⋆ Í dag fyllir Ryan Jensen 11 ár

## *9. Skírhósdagur* *Jer. 22.1-30*

### ZAREPTA
Samkomulegurnar í vár eru avlýstar. Biðið, at samkomurnar kortini fáa andaliga røkt og umsorgan!



### FILIPOYGGJAR, NTM
**Liz og Ragnar Niclasen**

Av korona vita vit ikki, hvat hendir í morgin. Men við teldu halda vit á at gera lærutilfar, so hvørgin av hjálparmonnum mínum nýtist at koma á gátt. Alt er stongt fyribils til 15. apríl, men vit sleppa at keypa inn. Vit gera alt fyri at hindra smittuni.

## *10. Langi fríggjadagur* *Fil. 4.1-23*



**NTM, FØROYAR**
**Erla og Ingvard Petersen**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 9, Tabita 6,**
**Debora 4, Natan 1**

Ráðstevnan Reach síðst í mars varð avlýst av korona. Biðið, at trúgvandi ikki gloyma, at tað er átrokandi neyðugt, at boðskapurin kemur til teirra, sum ongantíð hava hoyrt um frelsuætlan Guds.

## *11. Leygardagur* *Jer. 23.1-22*

**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Miriam Joy 15, Noah 13, Lydia 3**

Av smittuvanda er familjan nú aftur savnað. Hannah er komin aftur úr Føroyum, og Miriam varð kallað heim frá eftirskúlaferð í Honduras. Okkum tørvar nú vísdom og hugskot at vera Kristi likam og Guds samkoma í Skovlunde á annan hátt enn vanligt.

**DANMARK, Kolding**
**Jan og Anne Zachariassen**



Vit noyðast nú at brúka alnótina til gudstænastu og at leggja sjónbond út. Ferðin til Grikkalands og várstevnan eru avlýstar. Men Harrin varðveitir og leiðir okkum fram ígjøgnum ókenda tíð.

**DANMARK, Glostrup Frikirke**

## *12. Páskadagur* *Jer. 23.23-40*



**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 14, Rebekah 12, Lydia 10**

Vit arbeiða nú heimaníffrá, m.a. við at menna heimasíðuna kurdisite.com. Biðið, at netborna tilfarið á kurdiskum skal styrkja tey trúgvandi og vegleiða tey søkjandi. Kurdar hátíðarhildu nýggjár 21. mars, og vón okkara er, at tey søkja Gud í hesum árinum. Vit høvdu ætlanir um kurdiskt páskahald, men tað er avlýst.

## *13. Annar páskadagur* *Kol. 1.1-29*



**GRØNLAND**
**Juvel II**
**Anna og Óli Steinberg**

Hóast eg ikki havi ábyrgdina av ferðunum longur, verði eg partvíst við. Frá 25. juni í Aasiaat (Egedesminde) til 10. juli í Ilulissat (Jakobshavn), og frá 1. sept. í Kulusuk (Amassalik), til vit verða heima aftur uml. 19. sept. Í Eysturgrønlandi gera Niels og Miriam Vang serligt átak saman við trúgvandi grønlendingum og Juvel II.

**FØROYAR**
- **Maria og Jens Bech**
- **Rutt og John í Skemmuni**
- **Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
- **Vanja og Svein í Prestgarði,**
  **Jenny 12, Svend 11, Terji 7, Petra 6**

## *14. Summarmáli* *Jer. 24.1-10*



**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 9, Leah Ève 6, Abigail 0**
Jóhannis leiðir lovsang og røkir salin. Cécile og Jóhannis taka sær av ungdómsbólkinum.

## *15. Mikudagur* *Jer. 25.1-17*



**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**
Nógv arbeiði er hvørja viku at umseta frálæru til bíbliutímarnar, men samstundis lærir Solveig grønlendskt betur. Tað er serliga Johanne, ið hjálpir til at umseta. Vit eru í holt við Rómbrævið og biðja, at Harrin talar til hjørtuni og signar bíbliutímarnar.

**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**

## *16. Hósdagur* *Jer. 25.18-38*

**SVEIS, Nyon, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura, Reuben 6, Micah 6**
Skúlar og annað eru afturlatnir her til 30. apríl, so vit heimaskúla børnini og hava møtir og húsbólkar umvegis netið. Takk fyri forbøn fyri Jeanette. Hon stríðist enn við kroniska møði og strongd. Hetta hevur verið ein fíggjarligur smeitur, men vit gleðast í vissuni um, at Harrin er trúfastur.

## *17. Fríggjadagur* *Kol. 2.1-23*



**ÍRLAND,**
**Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

COVID-19 herjar. Skúlarnir hjá Sonju, Tim og Karinu eru stongdir, og tey eru øll heima. Daniel, sum skal giftast 18. apríl, hevur framvegis arbeiði, men unnusta hansara hevur mist arbeiðið. Eisini Sonja hevur mist arbeiðið. Øll tiltøk í samkomuni eru avlýst. Biðið um Guds varðveitslu!

**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

## *18. Leygardagur* *Jer. 26.1-24*



**ITALIA, Sant'Elia**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Noah 17, Megan 15,**
**Trisha 7, Emma 3**

Koronakreppan er ein avbjóðing í lívi og tænastu, tí býur okkara er stongdur. Men kreppan ger tó, at fólk eru meir søkjandi. Biðið fyri Pasquale, Domenico og systrunum Trifen og Emmu, sum øll eru millum tey, sum júst eru komin til trúgv, ella eru sera tætt trúnni.

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa (fj. arb. Italia)**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Koronavirus – bygdin er avbyrgd!

## *19. Sunnudagur* *Jer. 27.1-22*

**PAPUA NÝGUINEA, Madang**
**Natalie og Philip Hansen, Louis 2, Timon 0**

Húsini hjá okkum eru um at vera liðug, og nú fara vit at læra kovol málið. Fólk her eru spent, og tað er gott endiliga at fáa tíð at læra tey at kenna. Biðið, at vit skjótt læra málið.



**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 11, Noah 10, Karis 6,**
**Judah 4, Ethan 2**

Vit hava valt at vera her fyri at stuðla samkomuni og toymi okkara. Vit hava avmarkaða medisinska útgerð og ikki møguleika at evakuera í løtuni. Biðið um tryggleika, at einki óhapp hendir, og um frið og skynsemi viðvíkjandi COVID-19. Simon vónar at vitja Mengen samkomuna.

## *20. Mánadagur* *Kol. 3.1-4.1*



**TÝSKLAND, Hückeswagen,**
**Ethnos 360 (fyrrv. NTM)**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 8**

Við sorg boða vit frá, at ung kvinna úr Týsklandi doyði í druknivanlukku í Indonesia í mars. Hon var í stutttíðar tænastu hjá trúboðarahjúnum, har hon undirvísti børnunum. Tey trý børnini og ein onnur ung týsk kvinna, ið eisini undirvísir børnunum, vóru vitni til vanlukkuna. Okkum tørvar vísdóm og orku at handfara hesa kreppu. Biðið fyri sorgarbundnu familjuni, ið hevur mist dóttur og systur, og fyri trúboðarafamiljuni og hinari ungu kvinnuni.

## *21. Týsdagur* *Jer. 28.1-17*



**FILIPSOYGGJAR, Naplud**
**Monika og Tim Sharp**
**Ragnhild 16, Rebekka 15, Hanna 11**

Her á Palawan er flog- og sjóferðslan steðgað. Ikki er loyvt at koyra millum býirnar, og flestu handlar eru stongdir. Fólk hava útibann, tí sita vit fyri tað mesta við hús. Tim sleppur ikki at ferðast til ættarbólkarnar. Tíbetur fáa vit arbeitt á telduni. Kriminaliteturin í býnum veksur við rúkandi ferð, tí fyri tað mesta liva fólk av ferðavinnuni. Nú tey ikki hava arbeiði, eru tey frá sær sjálvum, tí tey eiga einki niðurfyri og hava ikki ráð at keypa mat.

## *22. Mikdagur* *Jer. 29.1-16*



**ONGLAND, Taunton, ECMI**
**Dorit og Simon Marshall**

Stevnan hjá ECMI í apríl varð avlýst av COVID-19. Ístaðin fyrireikar leiðslan talgilda stevnu at stroyma. Simon og aðrir leiðarar fyrireika talurnar. Nógvir trúðboðarar eru burturstaddir og hava ferðaforboð; teir kunnu tí ikki koma heim, heldur ikki at hjálpa gomlum foreldrum. Pápi Dorit, Hans Elmar, doyði 21. mars, men hon kundi ikki koma heim til jarðarferðina.

**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen, Ísak 17**

## *23. Hósdagur* *Jer. 29.17-32*



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 15, Aron 8, Noah Kristian 6**

Her í Chiang Mai er barnaskúlin stongdur; samkoman hevur avlýst øll tiltøk, og vit noyðast møguliga eisini at lata The Well aftur. Biðið, at vit framvegis trúføst megna at tæna. Harrin ræður, og vit kenna hansara frið.

## *24. Fríggjadagur* *Kol. 4.2-18*



**ÍSLAND, Akureyri, Agape Europe**
**Kristín Gerðalíð**

Í mars fóru vit undir at røkka út til fólk gjøgnum alnótina. Takkið, at vit kunnu brúka tøknina at koma í samband við fólk og verða til signing bæði fyri næmingar og onnur.

**– Reykjavík, Akurinn, Rósa og Jógvan Purkhús**
**– Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

## *25. Flaggdagur* *Jer. 30.1-24*



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Orsakað av COVID-19 hava bíbliutímarnir og badiaranke skúlin verið avlýstir síðan 16. mars. Bygdarfólkið er óttafult. Eg haldi á at týða brøvini saman við málhjálparum. Eg biði, at teir ikki verða sjúkir, og at eg kann gera arbeiðið liðugt.

★ Í dag fyllir Markus Tuohy 8 ár

## 26. Sunnudagur — Jeremias 31.1-19



### GUINEA VESTURAFRIKA, Tarencha, Nalu Marion og Hans Arni Jensen, Ryan 11

Val var í Guinea 22. mars at broyta grundlógina, so forsetin fær rætt at stilla uppaftur til næsta val á triðja sinni. Andstøðan er hart ímóti. Roknast kann við nógvum ófriði. Biðið fyri Afrika, sum ikki er so væl fyrireikað til korona, og fyri teimum, sum arbeiða saman við okkum. Vit fóru úr Føroyum til USA 25. mars.

## 27. Mánadagur — Jeremias 31.20-40



### JAPAN Shino og Hallur Mortensen Kano 10, Nana 8, Louie 6, Rio 0

Í apríl byrja vit í samkomuni undirvísing í enskum fyri børn. 12 børn umframt okkara egnu hava teknað seg; vit býta tey í tveir flokkar. Vit hava sagt foreldrunum, at vit eisini siga teimum bíbliusøgur. Biðið um vísdóm eisini at vísa teimum á Jesus.

**Útgevari:** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd:** Róland í Skorini, ábyrgd, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla:** Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057.
**Uppseting:** Palli Skorheim, tel. 290087.

## *28. Týsdagur* *2. Tess. 1.1-12*



**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**

Mest átrokandi er, hvussu vit verja okkum ímóti COVID-19; ikki bara at vera fyrivarin, men eisini at vera til reiðar at svara og hjálpa teimum, sum óttast. Biðið, at Harrin fær atgongd til mong hjørtu.

## *29. Mikudagur* *2. Tess. 2.1-17*



**OM, Logos Hope,**
**Femja Jacobsen**
**Olivia og Bogi Tróndheim, Fríði 4, Karita 2**

Av korona er Logos Hope vitjanin í Føroyum í juli útsett, tí skipið liggur avbyrgt í Kingston í Jamaika. Ongin er smittaður umborð enn. Virksemið hjá manningini umborð er sera avmarkað. Leiðslan roynir at finna aðrar, opnar dyr.

**OM**

Vit taka ímóti tilmeldingum til toymisferðir til Moldova og Albania umframt til TeenStreet, men vit vita enn ikki, hvussu korona fer at ávirka virksemið í summar.

**Myndasavn:** pallis76@yahoo.dk
**Prent:** Føroyaprent, tel. 314555.
**Telduposturl:** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða:** www.kbs.fo

**©KBS.** *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

## NÝGGJ BÓK!

**He Chose the Nails**

**190 kr.**




Kendi kristni høvundin Max Lucado hevur skrivað meir enn 30 bøkur. Henda, ein hin kendasta, kom út fyrstu ferð í 2000. Lucado fær okkum at hugsa um hann, sum leið krossdeyðan fyri okkum. Hann vil, at vit persónliga skulu hoyra Kristus teska: „Alt hetta gjørdi eg fyri teg". Í 15 kapitlum greiðir hann frá, hvussu Gud við deyða Kristusar á krossinum gevur okkum lyfti um fyrigeving, samfelag og vón; hann biður okkum leggja alt tað, sum dagliga nívir okkum, við kross Kristusar og hvíla har.

★ Í dag fyllir Rebekka Sharp 15 ár

Opið gerandisdagar kl. 14-18,
leygardag kl. 12-16.
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo